# Nú byrja vit at betala rokningina fyri fullveldið

**– Samgongan hevur lovað at skatturin skal lækka. Men samstundis verða ymiskir ósjónligir skattir lagdir á fólk, so í veruleikanum er als ikki talan um skattalætta, sigur Lisbeth Petersen**

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú skulu føroyingar av álvara byrjað at betala rokningina fyri fullveldið.

Tað er niðurstøðan hjá Lisbeth Petersen, nú hon hevur kagað í uppskotið til fíggjarlóg, sum vað løgd fyri Løgtingið týsdagin.

Forkvinnan í Sambandsflokkinum sigur, at hendan fíggjarlógin er eitt dømi um, at samgongan hevur ikki livað upp til tað, hon hevur lovað, bæði øllum føroyingum og sær sjálvum.

– Samgongan hevur sett sær sjálvum tann málsetning, at inntøkurnar á fíggjarlógini skuldi altíð veksa skjótari enn útreiðslurnar fyri at yvirskotið kundi økjast ár um ár.

Lisbeth Petersen sigur, at tað sær hon onki til í hesi fíggjarlógini.

– Samgongan hevur eisini lovað føroyingum skattalætta.

Men heldur ikki tað, sær forkvinnan í sambandsflokkinum nakað sum helst til.

– Gamaní lækkar vanligi skatturin nakað. Men samstundis verða ymisk avgjøld hækkað, eins og ymsir stuðulsskipanir verða tiknar burtur og hetta er ikki annað enn skattur, sum samgongan roynir at gera ósjónligan við at kalla tað umhvørvisavgjøld og heilsuavgjøld. Men, hvussu tað so enn verður kallað, so er hetta ikki annað enn eykaskattir.

Tað, sum hon sipar til, er, at avgjaldið á plastposar og ymiskt góðgæti, hækkar, samstundis sum mjólkarstudningurin og rentustudningurin til tey, sum hava sethúsalán, lækka.

– Tað tykist sum um at samgongan hevur ásannað, at hon hevði ikki ráð til lovaða skattalættan og tí leggur hon ymsar ósjónligar eykaskattir á fólk. Tað er rokningin fyri fullveldið, sum nú er komin, sigur forkvinnan í sambandsflokkinum.

Hon heldur, at samgongan eigur at vera so mikið ærlig, at hon nevnir hetta við sínum rætta navnið: Skattur.

– Vit vita øll, at tað er skálkaskjól at nevna hetta umhvørvisgjald og heilsugjald, tí veruluga orøkin til avgjøldini er at útvega landskassanum meiri inntøkur, sigur Lisbeth Petersen.

Samstundis spyr hon, hvar yvirtøkurnar eru í fíggjarlógini. Tað sær hon heldur heldur onki til.

– Tað kann vera, at samgongan loksins hevur ásannað, at hon hevur ikki ráð til at fremja nakrar yvirtøkur, sigur forkvinna sambandsfloksins.

### Mist álitið

Annars hevur Lisbeth Petersen púra mist álitið á fíggjarlógini hjá samgonguni.

– Fíggjarlógirnar, sum hendan samgongan hevur lagt, hava ikki verið veruligar. Fyri at pyntað úrslitið, hevur samgongan sett útreiðslurnar so lágt, at øll vitstu at tær tølini fóru ikki at halda. Úrslitið hevur verið ein long røð av eykajáttanunum. Í fjør varð so boðað frá, at núskuldi tað vera liðugt við hesum eykajáttanum. Men í gjár kom ein umbøn upp á 100 milliónir til ymisk endamál og áður hava vit játtað einar 70 milliónir.

– Sostatt kann váttast, at fíggjarlógin kom líkast tí, vit boðaðu frá.

Lisbeth Petersen sigur, at spurningurin er so, hvussu verður við hesari. Men hon vísir á, at inntøkurnar í samfelagnum veksa ikki so skjótt longur.

Hon heldur eisini, at summar av inntøkunum í fíggjarlógini eru heldur enn ikki óvissar. Samgongan ætlar at samráðast við danir um at lækka rentuna á uttanlandslánum, men tað úrslitið kenna vit ikki, tí tað skulu tveir partar til at samráðast.



*Lisbeth Petersen, forkvinna á sambandsflokkinum hevur ikki álit á fíggjarlógini og hon heldur, at samgongan skal kalla ein spaka fyri ein spaka*

Forkvinnan í sambandsflokkinum sigur, at hon hevur hugt í lániavtaluna, men hon dugir ikki at finna nakað um, at landsstýrið hevur rætt til at samráðast um rentuna av nýggjum. Tí verða ongar samráðingar uttan at danir góðtaka tað og tað vita vit ikki.

Samgongan ætlar eisini at vinna pening burturúr at selja íbúðarbygningin hjá Landssjúkrahúsinum og posthúsið á Argjum. Tað er óvist, hvat fæst fyri teir, serliga tí teir eru í so ringum standi.

Annars minnist Lisbeth Petersen, at tá ið Tórshavnar Kommuna ætlaði at leiga posthúsið á Argjum, var tað ógvuliga treyðugt, at Karsten Hansen góðtók tað, tí almenna umsitingin leigaði undir hvørjari trappu og hevði harðliga brúk fyri húsinum - men nú skal tað seljast kortini.

Forkvinnan á sambandsflokkinum heldur, at tað skuldi verið ein møguleiki fyri, at andstøðan kann ganga saman um nøkur felags sjónarmið, tá ið fíggjarlógin kemur til viðgerðar, tí tað er mangt, sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin eru samdir um, eitt nú at lækka talið á aðalráðum. Ein møguleiki, sum ongantíð hevur verið meiri sjálvsagdur enn tað sama, er at leggja oljumálaráðið undir okkurt av hinum ráðunum, sigur Lisbeth Petersen.

# Rakar húski við børnum ótrúliga hart

**Samtykkir Løgtingið fíggjarlógina hjá samgonguni fyri næsta ár, fer tað at raka húski við børnum órímiliga hart**

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta verður eitt slag fyri tey húski í Føroyum, sum hava børn.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins um uppskotið til fíggjarlóg, sum samgongan legði fyri Løgtingið týsdagin

Jóannes Eidesgasard sigur, at gongur, sum samgongan ætlar, verða fleiri eyka útreiðslur lagdar á húski, sum hava børn.

Og tað heldur hann er órímiligt.

Hann sigur, at væl er skattalætti við í uppskotinum. Men samstundis verða so nógv eyka avgjøld løgd á ymsar vørur, at tað etur allan skattalættan upp.

– Samgongan gevur við aðrari hondini, men tekur alt innaftur við hinari hondini.

Hann vísir á, at avgjaldið á sodavatni og ymsum søtmeti hækkar og tað rakar fyrst og fremst tey húski, sum hava børn. Samstundis verður studningurin til mjólk lækkaður. Avleiðingin av tí er, at mjólkin dýrkar og rakar eisini húskini við smábørnum. Somuleiðis skal uppihaldspeningurin takast av.

Nevnast kann eisini, at ætlanin er at lækka rentustuðulin til tey, sum hava sethúsalán. Eisini tey, sum hava sethúsalán eru fyri tað mesta yngri húski við børnum.

Formaður javnaðarfloksins sigur, at nógv, sum hava bygt hús, eru ógvuliga hart fyrispent, so tað tekur teimum ógvuliga fast at rentustuðulin lækkar, sama, hvussu lítil lækkingin er.

– Alt hetta er at ganga húski við børnum ótrúliga nær.

Yvirhøvur dámar formanninum í javnaðarflokkinum illa, at rákið er tann vegin, at beinleiðis skatturin skal lækka, men at avgjøld og brúkaragjøld skulu hækka ístaðin.

– Við beinleiðis skatti er møguleikin fyri at leggja so tilrættis at teir breiðastu herðarnir bera tyngstu byrðarnar. Við brúkaragjøldum og avgjøldum annars, vendir tann tungi endin altíð niðureftir, tí ein, sum forvinnur lítið, hevur verri ráð at keypa mjólk og aðrar vørur, tá ið prísirnir hækka og tað kann fáa fólk at minka nýtsluna, eisini á neyðsynjarvørum.

Samstundis verða fleiri og fleiri málsøki løgd undir kommunurnar og tað kann føra við sær, at tænastustøðið til landsins borgarar fer at vera ymiskt, alt eftir, hvar í landinum teir búgva.

– Sostatt bendir alt á, at vit eru í ferð við at venda samhaldsfasta samfelagnum bakið



*– Alt bendir á, at vit eru í ferð við at venda samhaldsfasta samfelagnum bakið, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins*

### Røra ikki sjálvsagdar møguleikar

Samstundis heldur Jóannes Eidesgaard, at tað forargiligt at síggja, at sjálvsagdir sparimøguleikar, sum leypa í eyguni á hvørjum mansbarni, verða ikki rørdur.

Jóannes Eidesgaard sipar til almennu miðfyrisitingina. Tá ið hendan samgongan tók við fyri seks árum síðani, kostaði miðfyrisitingin 58 milliónir. Síðani er hon meiri enn tvífaldað, tí nú kostar hon næstan 140 milliónir.

– Hetta rørir samgongan ikki, tí øll hesi aðalráðini eru fyri at fáa politisku kabalina í samgonguni at ganga upp, so at eisini miðflokkurin og sjálvstýrisflokkurin kundi fáa hvør sítt aðalstýri. Tað hava samgongulimir sjálvir viðgingið.

– Tað er nógv fyri at knokkroyta húskini við børnum so illa, samstundis sum tað verður skoytað beint tvørturyvir sjálvsagdar sparimøguleikar.

Hann nevnir at tað er ongin orsøk til at hava eitt oljumálaráð, tí vit hava onga olju, men tað er friðhalga fyri at fáa samgonguna at halda.

### Fer ikki at halda

Jóannes Eidesgaard sigur, at av royndum hesi seinstu árini hevur samgongan undirmett útreiðslurnar so tað munar. Avleiðingin av tí hevur verið eitt hav av eykajáttanum.

– Uppskotið, sum nú er lagt fram, er onki undantak og verður hon samtykt sum hon er, verður eisini neyðugt við fleiri eykajáttanum komandi ár.

Hann nevnir sum eitt dømi, at bara átta milliónir eru settar av til útgerð til sjúkrahúsini, hóast nýggja Landssjúkrahúsið skal takast í nýtslu og krevur útgerð fyri yvir 30 milliónir.

Annars heldur formaður javnaðarfloksins, at fíggjarlógin hevur ymisk tekin um, at tað sansar at. Eitt nú er ætlanin at selja almennar bygningar. Somuleiðis verða málsøki løgd út á kommunurnar, uttan at tær fáa endurgjald fyri tað. Enntá verður skúlabarnaflutningurin lagdur út til kommunurnar. Tað sparir landinum eina góða millión, so nær gongur samgongan, nú hon leggur fíggjarlóg.

– Tað er onki dulsmál, at eitt lítið hóttafall er í búskapinum og at hann veksur ikki so skjótt, sum hann hevur gjørt.

Tað hevur eisini verið neyðugt hjá samgonguni at ganga óvanliga nær fyri at fáa alt at ganga upp og tá ið avdráttirnir til danska statin eru goldnir, gevur hon beinleiðis hall.

Samstundis eru ymisk verk, sum eru rættiliga illa sperd, eitt nú heimarøktin og tað hóvar mær illa, samstundis sum sjálvsagdir sparimøguleikar ikki verða rørdir fyri frið skyld í samgonguni.



# Samgonguskjalið brotið

**Avlopið skal vaksa hvørt ár, stendur í samgonguskjalinum, men tað samsvarar ikki við komandi fíggjarlóg. Ein slík orðing er ikki eftirfarandi, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður. Hóast avlopið minkar, heldur hann, at setningurin er rokkin, og hann fegnast um eitt fíggjarlógaruppskot, sum ger daprar spádómar til skammar**

FÍGGJARLÓG 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*




*Daprir spádómar um, at einki fór at bera til, eru gjørdir til skammar, er niðurstøðan hjá Karsten Hansen, nú fíggjarlógaruppskotið er lagt fyri løgtingið.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eitt samgonguskjal skal ikki altíð takast fyri fult.

Tað er niðurstøðan, eftir at uppskot til fíggjarlóg fyri 2004 er lagt fram. Í fíggjarlógini stendur at lesa, at búskaparpolitikkurin byggir á samgonguskjalið frá 2002. Víst verður millum annað til orðingina, at »búskaparliga skal munurin millum inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini vaksa positivt á hvørjum ári«.

Á komandi fíggjarlóg er yvirskotið sett til 100 milliónir krónur, sum er 140 milliónir krónur minni, enn fíggjarlógin fyri 2003 miðaði eftir. Sostatt verður samgonguskjalið ikki hildið á hesum øki, men tað tekur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, ikki so tungt.

– Samgonguskjalið er skrivað eina heita nátt. Tað byggir á eitt ynski um at minka blokkin burtur sum skjótast. Men vit ráða ikki yvir øllum fortreytum í búskapinum, og tí kunnu vit sjálvandi ikki garantera eitt vaksandi yvirskot hvørt ár. Tað ræður eisini um at hava javnvág í, so tað hvønn dag er gott at vera føroyingur, sigur Karsten Hansen.

Tað er landsstýrismaðurin væl nøgdur við. Hóast uppskotið til fíggjarlóg fyri 2004 leggur upp til, at almennu Føroyar spara stívliga eitt prosent í mun til ársins fíggjarlóg, sigur hann vælferðarsamfelagið verða útbygt og endurnýggjað, eins og undirstøðukervið verður útbygt.

– Setningurin er rokkin, og samgongan kann fegnast um eitt fíggjarlógaruppskot, ið tryggjar øllum føroyingum eitt væl virkandi samfelag, har vælferðin er á høgum stigi, og vinnumøguleikarnir eru góðir. Daprir spádómar um, at einki fór at bera til, eru gjørdir til skammar, er niðurstøðan hjá Karsten Hansen, nú fíggjarlógaruppskotið er lagt fyri løgtingið.

### Eyka avdráttir

Í stuttum leggur fíggjarlógin upp til eitt avlop upp á 100,6 milliónir krónur. Inntøkurnar eru mettar til 3,571 milliardir krónur, og útreiðslurnar eru 3,470 milliardir krónur. Almennu Føroyar skulu spara 37 milliónir krónur, og samstundis verða íløgur gjørdar fyri tilsamans 312 milliónir krónur.

Ársins yvirskot á 100 milliónir krónur er áðrenn avdráttir av lánunum til danska ríkiskassan. Karsten Hansen vísir á, at avdráttirnir ikki skulu trekkjast frá komandi fíggjarlóg, tí farið verður beinleiðis í landsbankan eftir peninginum til avdráttir.

– Landskassin hevur sera gott gjaldføri, men rentuvinningurin er lítil, tí altjóða rentustigið er so lágt. Mett verður tí, at tað loysir seg betur at gjalda ein eyka avdrátt av skuldini til danska ríkiskassan enn at lata ov nógv gjaldføri standa í Landsbanka Føroya. Semja er um at rinda umleið 500 milliónir krónur í eyka avdrátti. Mett verður, at landskassin sparir umleið 12 milliónir krónur í nettoútreiðslum við hesum eyka avdrátti, greiðir landsstýrismaðurin frá.

Ætlanin er eisini at leggja 1,2 milliardir krónur av láninum um, og tað skal spara landskassanum 20 millónir krónur í rentuútreiðslum í 2004. Spurdur, hvat hann ger, um danir ikki vilja umfíggja, svarar Karsten Hansen:

– Tað er ikki ein spurningur, um teir vilja. Tað er ein partur av avtaluni, at vit kunnu umfíggja lánið, tá vit vilja, og nú hava vit eina søguliga lága rentu, sum vit eiga at gera okkum dælt av, sigur Karsten Hansen.

Avtalan um skuld landskassans til ríkiskassan er frá 1998. Fasta rentan varð sett til 5% um árið, men síðan er altjóða rentustigið lækkað niður um rentuna á landskassaláninum.

### Verri enn ætlað

Samstundis, sum komandi fíggjarlógin sær út til at geva eitt væl minni avlop enn ársins fíggjarlóg legði upp til, er greitt, at úrslitið í ár verður nógv verri enn væntað.

Roknað varð við einum yvirskoti í 2003 á 240 milliónir krónur áðrenn avdráttir. Nú er líkt til, at avlopið ikki verður meira enn 59 milliónir krónur, tá samanum kemur. Sostatt er talan um eina undirbúskettering, sum tey rópa tað. Eftir avdráttir er talan um eitt stórt gjaldførishall á 90 milliónir krónur, sum verður fíggjað úr landskassanum.

Vóru avdráttirnir komandi ár ikki tiknir úr landsbankanum, var eisini talan um undirskot á fíggjar-lógini komandi ár. Men Karsten Hansen tvíheldur kortini um, at Føroyar stevna ímóti einum sjálvberandi búskapi, sum samgonguskjalið leggur upp til.

– Arbeiðið við fíggjarlógini hevur verið umfatandi og málrættað. Enn eitt stig er tikið fram ímóti einum sjálvberandi føroyskum búskapi. Enntá í eini tíð, har lítil og eingin vøkstur er hevur verið í altjóða búskapinum, sigur landsstýrismaðurin og vísir eitt nú á, at skuldin verður niðurgoldin skjótari, enn lánsavtalan áleggur okkum.

**Fíggjarlógin 2004**

RLÚ-avlop: 100,6 mió. kr.
Inntøkur: 3,571 mia. kr
Útreiðslur: 3,470 mia. kr
Íløgur: 312 mió. kr.
Skattalætti: 70 mió. kr.
Almenn sparing: 37 mió. kr.

## Avgjøld eta skattalættan

**Etur tú bomm, roykir, hevur børn og sethús, so verður lítið eftir av tí skattalættanum, sum landið bjóðar komandi ár**

SKATTALÆTTI
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Skattalættin til føroyingar verður fíggjaður við øktum avgjøldum. Tað kann lesast úr fíggjarlógini fyri 2004, sum Karsten Hansen júst hevur lagt fram.

Samgongan heldur lyftið um skattalætta, sum var 52 milliónir krónur í ár og verður 77 milliónir krónur næsta ár. Men skattalættin næsta ár verður nærum mótsvaraður av øktum avgjøldum og mistum stuðli.

Sonevnda heilsuavgjaldið er ein partur. Tilsamans verða 37 milliónir krónur tiknar inn tann vegin. Lagdar verða tríggjar krónur omaná hvønn litur av sodavatni. Tað gevur 10 milliónir krónur eyka í landskassan. Hvør sigarett verður 25 oyra dýrari. Tað gevur eisini 10 milliónir krónur. Góðgæti og sjokoláta geva 10 milliónir, søtar keks og smákøkur geva 2 milliónir krónur og plastikkberiposar geva 5 milliónir krónur.

Barnafamiljurnar merkja eisini sparingarnar, tí mjólkin fer aftur at dýrka. Hesaferð við 15 oyru liturin. Mjólkastuðulin minkar hálva millión komandi ár, og tað er bara stutt síðan, at hann minkaði við tveimum milliónum um árið.

Rentustuðulin til sethúsalán minkar við 16 milliónum krónum, sum landið sparir. Og afturat øllum hesum kemur nógv umrøddi stuðulin til uppihaldspening, sum helst hvørvur. Tað sparir landinum átta milliónir krónur.

Tá samanum kemur, fara mistur stuðul og økt avgjøld at tátta upp ímóti tí skattalættanum, sum landið gevur sínum borgarum.

# Dýrari at eiga hús

**Rentustuðulin til sethúsalán lækkar næsta ár úr 40 niður í 37 prosent. Tað er partur av spariætlanini hjá landsstýrinum, sum legði fíggjarlógina fyri 2004 fram týsdagin**

RENTUSTUÐUL
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Fíggjarlógin gevur eitt lítið yvirskot, hóast lækkandi inntøkur, og tað verður gjørt við sparingum. Ein sparing er 16 milliónir krónur í rentustuðli til húsalán. Sambært Karsten Hansen, landsstýrismanni við fíggjarmálum, kunnu illa sperdu húseigararnir so aftur rokna við einari lækking á tvey prosent í 2005.

Rentustuðulin er annars lækkaður úr 48 prosentum niður í 40 prosent síðstu árini. Tað hevur ljóðað, at nú skuldu húseigarar fáa ein skáa, og rentustuðulin fáa frið. Men í heyst verður lógaruppskot lagt fyri løgtingið um at lækka stuðulin aftur. Sambært Karsten Hansen er tað langt síðan sett í kortið.

– Ætlanin við rentustuðlinum hevur frá byrjan verið, at hann skuldi lækka so líðandi, soleiðis at tað ikki rakar tey hart, sum hava sett búgv síðstu árini. Hetta fær samstundis prísin niður hjá teimum, sum ætla at keypa hús, og so mugu vit ikki gloyma, at vit geva skattalætta í somu vending, so fólk hava meira eftir, tá av tornar, sigur Karsten Hansen.

Hvussu er og ikki, so verður tað dýrari at hava húsalán. Siga vit, at lánið er ein millión krónur og rentan er 5 prosent, so er rentuparturin 50.000 krónur um árið. Tá rentustuðulin fyri nøkrum árum síðan var 48 prosent, fingu húseigarar 24.000 krónur afturgoldið. Í ár fáa somu fólk 20.000 krónur afturgoldið í rentustuðli.

Verður samtykt í løgtinginum, at rentustuðulin skal lækka niður í 37 prosent, minkar stuðulin við 1.500 krónur um árið afturat. Og í 2005 minkar hann so einar 1.000 krónur afturat, so fólk bara fáa góðar 17.000 krónur í rentustuðli. Við øðrum orðum einar 7.000 krónur minni eftir fimm árum.